LYDIA DIDRIKSEN
Mia og Lias rima
Myndir: Solveig Hansen

Hola

Mia og Lias tutla og mutla.
Tey práta og láta.
Tey flenna og renna beint inn í holuna.

Stova

Holan er inni í stovuni.
Í holuni eru pútur.
Ein blá og ein gul og ein pink.
Mia og Lias sita á pútum og ríma.

Hosa

„Ein hosa,“
sigur Mia.
„Í einum posa,“
flennir Lias.

Lias sigur:
„Mia, kann ein hosa tosa
í einum posa?“

Rosina

Gardina

So rópa Mia og Lias:
„Bestu vinir
dáma so væl rosinur
og elska kaninir
og gular gardinur.”

Spann

„Heini sá
ein mann,
sum rann
og rann
undan eini
spann.
So kom ein mús
og tók hann til hús,“
rímar Mia.

„Lias, nú skalt tú,“ sigur Mia.

„Ein vátur
bátur
og ein sól,
sum mól
í eini á,
sum eg sá,“
rímar Lias.

„Og nú skalt tú, Mia!“

„Eg lá í eini á,
sum Lias sá.
Mín tá var blá
og nøsin grá,“
rímar Mia.

Lias sigur:
„Ein tikari fór ein túr.
Hann fann eitt búr
og fekk sær ein lúr.
Tá kom ein ...“

So rópa Mia og Lias:
„Nú skalt **tú** ríma!“

Mia og Lias ríma
© 1. útgáva 2010: Bókadeild Føroya Lærarafelags
og Føroya Skúlabókagrunnur
© søga: Lydia Didriksen
© myndir: Solveig Hansen
Viðgjørt lesifrøðiliga: Sissal Rasmussen og Ásla Huusgaard
Umbrotið, prentað og heft: Føroyaprent, Tórshavn 2010

ISBN: 978-99918-1-793-4

Bókin er partur av krabbarøðini hjá Bókadeild Føroya
Lærarafelags og Føroya Skúlabókagrunni.

Svanamerktur prentlutur 541 705

Didriksen, Lydia
Mia og Lias ríma